

# Gymnasialar útbúgvingar

# Innihald


| | |
|---|---|
| Inngangur | 3 |
| Gymnasial útbúgving | 4 |
| Búskaparbreyt | 6 |
| Hugbreyt | 7 |
| Náttúrubreyt | 8 |
| Tilfeingisbreyt | 9 |
| Tøknibreyt | 10 |
| Fyrireikingarbreyt | 11 |
| Upptøka | 12 |
| Stuðul | 12 |
| Undirvísingartilfar | 13 |
| Próvtøka | 13 |
| Hægri lestur | 13 |
| Møtiskylda | 14 |
| Stakgreinalestur og sjálvlestur | 14 |
| Skúla- og lestrarvegleiðing | 14 |
| Skúlar | 15 |
| Hvat er nýtt í nýggju skipanini? | 16 |
| Hent kunningartilfar | 16 |





## Inngangur

Tá ið tú skalt velja lestrarbreyt á gymnasialum miðnámsskúla, eigur tú at hugsa um, hvørja útbúgving tú hevur hug at halda fram við eftir loknan miðnámsskúla. Ein gymnasial miðnámsútbúgving er nevniliga fyrst og fremst ein fyrireiking til hægri lestur og hægri útbúgving innan ávíst øki ella yrki.

Tú kanst ráðføra teg við skúlavegleiðaran á tínum fólkaskúla um útbúgvingarmøguleikar eftir lokna miðnámsútbúgving, ella tú kanst seta teg í samband við ein lestrarvegleiðara á einum miðnámsskúla og tosa við hann um framhaldandi útbúgvingarmøguleikar.

Tú hevur møguleika at velja millum fimm trý ára lestrarbreytir. Búskaparbreyt, hugbreyt, náttúrubreyt, tilfeingisbreyt og tøknibreyt. Harafturat ber til at velja fyrireikingarbreytina, sum er ein tvey ára breyt, ið serliga er ætlað tilkomnum næmingum.

Í hesum faldaranum verður greitt frá einstøku breytunum. Hvussu tær eru uppbygdar, hvørjar lærugreinirnar eru, hvat eyðkennir ymisku breytirnar, og hvørjar møguleikar tær geva.

Greitt verður somuleiðis frá felagsviðurskiftum, sum eru galdandi fyri næmingar á øllum breytunum. T.d. lestrarstuðul, upptøka, møtiskylda, próvtøka og undirvísingartilfar.

Einstøku skúlarnir hava eisini kunningartilfar, ið viðvíkur viðurskiftum, sum eru serlig á skúlanum. T.d. vallærugreinir, hølisviðurskifti, ferðsluviðurskifti og bústaðarmøguleikar.

# Gymnasial útbúgving

Tú kanst taka eina gymnasiala útbúgving á seks ymiskum breytum, sum hvør sær hava síni eyðkenni. Breytirnar geva tær møguleika at velja gymnasiala útbúgving eftir egnum áhugamálum og ætlanum.

Breytirnar eru allar bygdar upp við felagslærugreinum, breytalærugreinum og vallærugreinum.

Felagslærugreinir eru kravdar lærugreinir uttan mun til breytaval.

Breytalærugreinir eru kravdar lærugreinir, sum eyðkenna einstøku breytirnar.

Vallærugreinir eru lærugreinir, næmingurin kann velja eftir egnum áhuga, tó við serstøkum avmarkingum á einstøku breytunum.

Lærugreinirnar eru flokkaðar í C, B og A stig har C er lægsta stig og A hægsta stig, tú kanst náa í eini miðnámsútbúgving.

Á búskapar-, hug- og náttúrubreytini skalt tú hava í minsta lagi 4 A-stig og 3 B-stig lærugreinir; á tilfeingis- og tøknibreytini skal tú hava í minsta lagi 3 A-stig og 4 B-stig, og á fyrireikingarbreytini skal tú í minsta lagi hava 2 A-stig og 3 B-stig.

**BREYTIRNAR ERU:**

- Búskaparbreyt
- Hugbreyt
- Náttúrubreyt
- Tilfeingisbreyt
- Tøknibreyt
- Fyrireikingarbreyt

Fyrsta árið á einari gymnasialari útbúgving fylla felagslærugreinirnar nógv á tímatalvuni, meðan 2. og 3. árið taka breytalærugreinirnar og vallærugreinirnar so líðandi yvir.

### Felagslærugreinirnar eru:

- Føroyskt A
- Enskt C
- Søga C
- Ítróttur og heilsa C
- Samfelagsfrøði C
- Støddfrøði C

Nærri verður greitt frá breytalærugreinum og vallærugreinum undir einstøku breytunum.



# Búskaparbreyt

Á búskaparbreytini verður dentur lagdur á búskaparlig- og samfelagslig evni innan eitt nú roknskap, marknaðarføring og samfelagsbúskap. Eisini verður dentur lagdur á mál og altjóða viðurskifti.

Undirvísingin á búskaparbreytini er nakað øðrvísi enn tað, tú kennir frá fólkaskúlanum. Nakað er sjálvandi vanlig floksundirvísing, men bólka- og verkætlanararbeiði er eisini partur av gerandisdegnum. Í hesum fært tú møguleika at arbeiða sjálvstøðugt við størri uppgávum.

Námsferðir, virkisvitjanir og smærri verkætlanir uttanfyri skúlan og skúlatíðina eru vanlig, á búskaparbreytini.

Undirvísingin er á Føroya Handilsskúla í Tórshavn og Føroya Handilsskúla á Kambsdali.

## Felags- og breytalærugreinir

- Enskt B
- Føroyskt A
- Altjóða búskapur B
- Søga B
- Sølubúskapur B
- Virkisbúskapur B
- ítróttur og heilsa C
- Samfelagsfrøði C
- Støddfrøði C
- Vinnulívsrættur C

## Vallærugreinir

Á búskaparbreytini skal næmingurin velja nakrar vallærugreinir. Tá hesar verða valdar eru nakrar treytir, sum skulu tryggja, at samlaða lærugreinasamansetingin í próvnum er í samsvari við endamálið hjá breytini. Tú skal velja í minsta lagi trý A stig og eitt B-stig. Av A-stigunum skal minst eitt vera búskaparligt. T.v.s. antin virkis-, sølu- ella altjóða búskapur.

## Framtíðarmøguleikar

Búskaparbreytin gevur tær møguleika at søkja um upptøku á øllum hægri lærustovnum. Tær lærugreinir og tey lærugreinastig tú velur, kunnu ávirka tínar møguleikar at koma beinleiðis inn á einstakar útbúgvingar. Tí er umráðandi at kunna seg um hesi viðurskifti, áðrenn man velur vallærugreinir og lærugreinastig.

Útbúgvingin hevur sum mál at fyrireika teg til hægri lestur á handilsháskúla, universiteti og aðrar víðari útbúgvingar. Útbúgvingin er eisini góð barlast, um tú ætlar í læru á t.d. skrivstovu, í handli ella í banka.

# Hugbreyt

Á hugbreytini verður dentur lagdur á málslig og hugvísindalig evni. Eisini verður dentur lagdur á almennandi evni so sum skapandi lærugreinir og náttúrulærugreinir.

Undirvísingin á hugbreytini er nakað øðrvísi enn tað, tú kennir frá fólkaskúlanum. Nógv er vanlig floksundirvísing, men bólka- og verkætlanararbeiði er eisini partur av gerandisdegnum. Á hugbreytini fært tú eisini møguleika at arbeiða sjálvstøðugt við størri uppgávum.

Námsferðir, vitjanir og smærri verkætlanir uttanfyri skúlan og skúlatíðina eru vanlig, á hugbreytini.

Undirvísingin er á Miðnámsskúlanum í Hovi, Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í Hoydølum og Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Eysturoy.

## Felags- og breytalærugreinir

- Enskt A
- Føroyskt A
- Søga A
- Ítróttur og heilsa C
- Landafrøði C
- Lívfrøði C
- Religión C
- Samfelagsfrøði C
- Støddfrøði C

## Vallærugreinir

Á hugbreytini skal næmingurin velja nakrar vallærugreinir. Tá hesar verða valdar eru nakrar treytir, sum skulu tryggja, at samlaða lærugreinasamansetingin í próvnum er í samsvari við endamálið hjá breytini. Hesar eru:

1. Eitt byrjanarmál ella framhaldsmál (týskt, franskt, spanskt, russiskt o.tíl.) á A-stigi
2. Eitt annað byrjanarmál ella framhaldsmál (týskt, franskt, spanskt, russiskt o.tíl.) á B-stigi ella danskt á A-stigi
3. Tvær felagslærugreinir ella breytarlærugreinir, ið verður lyftar frá C til B
4. Ein onnur felagslærugrein ella breytarlærugrein, ið verður lyft frá C til B
5. Ein listalærugrein (tónleikur, leiklist, myndlist ella miðlakunnleiki) á C-stigi

## Framtíðarmøguleikar

Við einum prógvi frá hugbreytini kanst tú søkja inn á allar hægri framhaldsútbúgvingar, tó við teimum avmarkingum, sum framhaldsútbúgvingarnar seta viðvíkjandi lærugreinum og lærugreinastigum.

Við einum prógvi frá hugbreytini hevur tú serliga ognað tær førleika at søkja inn á tær hugvísindaligu framhaldsútbúgvingarnar.

## Náttúrubreyt

Á náttúrubreytini verður dentur lagdur á náttúruvísindalig evni. Eisini verður dentur lagdur á almennandi evni so sum skapandi lærugreinir og mállærugreinir.

Undirvísingin á náttúrubreytini er nakað øðrvísi enn tað, tú kennir frá fólkaskúlanum. Nógv er vanlig floksundirvísing, men bólka- og verkætlanararbeið er eisini partur av gerandisdegnum. Á náttúrurbreytini fært tú eisini møguleika at arbeiða sjálvstøðugt við størri uppgávum.

Námsferðir, vitjanir og smærri verkætlanir uttanfyri skúlan og skúlatíðina eru vanlig, á náttúrubreytini.

Undirvísingin er á Miðnámsskúlanum í Hovi, Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í Hoydølum og Studentaskúlanum og HF-Skeiðnum í Eysturoy.

### Felags- og breytalærugreinir

- Føroyskt A
- Søga A
- Alisfrøði B
- Enskt B
- Støddfrøði B
- Evnafrøði C
- ítróttur og heilsa C
- Landafrøði C
- Lívfrøði C
- Religión C
- Samfelagsfrøði C

### Vallærugreinir

Á náttúrubreytini skal næmingurin velja nakrar vallærugreinir. Tá hesar verða valdar eru nakrar treytir, sum skulu tryggja, at samlaða lærugreinasamansetingin í próvnum er í samsvari við endamálið hjá breytini.

1. Ein náttúrulærugrein (alisfrøði, evnafrøði, lívfrøði) ella støddfrøði verður lyft frá B til A
2. Ein felagslærugrein ella breytarlærugrein verður lyft frá B til A
3. Evnafrøði ella lívfrøði verður lyft frá C til B
4. Ein felagslærugrein ella ein breytarlærugrein verður lyft frá C til B
5. Ein listalærugrein (tónleikur, leiklist, myndlist ella miðlakunnleiki) á C-stigi

### Framtíðarmøguleikar

Við einum prógvi frá náttúrubreytini kanst tú søkja inn á allar hægri framhaldsútbúgvingar, tó við teimum avmarkingum, sum framhaldsútbúgvingarnar seta viðvíkjandi lærugreinum og lærugreinastigum.

Við einum prógvi frá náttúrubreytini hevur tú serliga ognað tær førleika at søkja inn á tær náttúruvísindaligu framhaldsútbúgvingarnar.

# Tilfeingisbreyt

Á tilfeingisbreytini verður serliga undirvíst í náttúruvísindaligum lærugreinum, og breytin er serliga ætlað teimum, sum hava áhuga fyri náttúru, náttúrutilfeingi, umhvørvi og burðardygd. Tískil er talan um eina grøna breyt.

Eitt av eyðkennunum við tilfeingisbreytini eru arbeiðshættirnir, sum eru øðrvísi enn tað, sum tú kennir frá fólkaskúlanum. Undirvísingin er í stóran mun skipað sum verkætlanir við grundarlagi í arbeiði á starvsstovu, á granskingarstovnum og úti í náttúruni, har tú sleppur at royna skúlalærdóm í verki.

Námsferðir, virkisvitjanir og smærri verkætlanir uttanfyri skúlan og skúlatíðina eru vanlig, á tilfeingisbreytini.

Undirvísingin er á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna.

## Felags- og breytalærugreinir

- Føroyskt A
- Tilfeingi A
- Enskt B
- Evnafrøði B
- Lívfrøði B
- Støddfrøði B
- Søga C
- Tilfeingisfrøði B
- Alisfrøði C
- ítróttur og heilsa C
- Samfelagsfrøði C
- Samskiftistøkni C

## Vallærugreinir

Á tilfeingisbreytini skal næmingurin velja nakrar vallærugreinir. Tá hesar verða valdar, er ein treyt, at ein teirra skal lyfta eina felags- ella breytalærugrein frá B til A. Hetta tryggjar, at samlaða lærugreinasamansetingin í próvnum er í samsvari við endamálið hjá breytini.

## Framtíðarmøguleikar

Við prógvi frá tilfeingisbreytini er tað mest sjálvsagt at lesa náttúruvísindaligar lærugreinir, sum t.d. lívfrøði, um tú fert at lesa á hægri lærustovni, men til ber eisini at velja aðra útbúgvingarleið. Prógvið gevur almennan lestrarførleika javnsett hinum breytunum við teimum avmarkingum, sum hægri útbúgvingarstovnar seta um ávís stig í ávísum lærugreinum. Við próvnum kanst tú tó eisini skapa tær eina framtíð sum t.d. náttúruvegleiðari, lívfrøðiatstøðingur ella íverksetari.



## Tøknibreyt

Á tøknibreytini verður dentur lagdur á náttúruvísindaligu lærugreinirnar støddfrøði, tøkni, alisfrøði, lívfrøði og evnafrøði.

Eitt av eyðkennunum á tøknibreytini er, at arbeiðshættirnir eru øðrvísi enn tað, tú kennir frá fólkaskúlanum. Undirvísingin er í stóran mun skipað sum verkætlanir og fer fram á starvsstovum og verkstøðum, har tú í stóran mun roynir skúlalærdóm í verki.

Námsferðir, virkisvitjanir og smærri verkætlanir uttanfyri skúlan og skúlatíðina eru vanlig, á tøknibreytini.

Undirvísingin er á Tekniska skúla í Klaksvík.

### Felags- og breytalærugreinir

- Føroyskt A
- Tøkni A
- Alisfrøði B
- Enskt B
- Evnafrøði B
- Støddfrøði B
- Tøknifrøði B
- Ítróttur og heilsa C
- Lívfrøði C
- Samfelagsfrøði C
- Samskiftistøkni C
- Søga C

### Vallærugreinir

Á tøknibreytini skal næmingurin velja nakrar vallærugreinir. Tá hesar verða valdar, er ein treyt, at ein teirra skal lyfta eina felags- ella breytalærugrein frá B til A. Hetta tryggjar, at samlaða lærugreinasamansetingin í próvnum er í samsvari við endamálið hjá breytini.

### Framtíðarmøguleikar

Við einum prógvi frá tøknibreytini eru fjølbroyttir møguleikar – alt eftir hvørjar lærugreinir næmingurin velur. Tøknibreytin vendir sær serliga til næmingar, sum ætla sær at fara undir eina tøkniliga ella náttúruvísindaliga útbúgving sum t.d. verkfrøði. Annars ber til við einum prógvi frá tøknibreytini at søkja inn á allar hægri framhaldsútbúgvingar, tó við teimum avmarkingum, sum útbúgvingarstovnarnir seta um ávísar lærugreinir á ávísum stigi.



## Fyrireikingarbreyt

Fyrireikingarbeytin er ein almennandi og lestrarfyrireikandi útbúgving, ið fevnir breitt um fleiri evni.

Undirvísingin á fyrireikingarbreytini er nakað øðrvísi enn tað, tú kennir frá fólkaskúlanum. Nógv er vanlig floksundirvísing, men bólka- og verkætlanararbeið, er eisini partur av gerandisdegnum. Á fyrireikingarbreytini fært tú eisini møguleika at arbeiða sjálvstøðugt við størri uppgávum.

Útbúgvingin er serliga ætlað tilkomnum, sum hava havt ein steðg frá skúlanum, men ætla sær víðari á eina styttri ella miðallanga hægri útbúgving.

Námsferðir, vitjanir og smærri verkætlanir uttanfyri skúlan og skúlatíðina eru vanlig, á fyrireikingarbreytini.

Undirvísingin er á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í Hoydølum og Studentaskúlanum, HF-skeiðnum í Eysturoy og HF-skeiðnum í Klaksvík.

### Kravdar lærugreinir

- Føroyskt A
- Søga A
- Enskt B
- Ítróttur og heilsa C
- Religión C
- Samfelagsfrøði C
- Støddfrøði C

### Vallærugreinir

Á fyrireikingarbreytini skal næmingurin velja nakrar vallærugreinir. Tá hesar verða valdar, eru nakrar treytir, sum skulu tryggja, at samlaða lærugreinasamansetingin í próvnum er í samsvari við endamálið hjá breytini.

1. Eitt byrjanarmál ella framhaldsmál á B-stigi (týskt, franskt, spanskt, russiskt o.tíl.) ella danskt á A-stigi
2. Eina lærugrein, ið verður lyft frá C til B,
3. Eina náttúrulærugrein (alisfrøði, evnafrøði, lívfrøði ella landafrøði) á C-stigi
4. Eina listalærugrein (tónleikur, leiklist, myndlist ella miðlakunnleiki) á C-stigi

### Framtíðarmøguleikar

Útbúgvingin gevur atgongd at søkja inn á hægri lærustovnar. At útbúgvingin, ið tekur tvey ár, í fleiri lærugreinum endar við lægri stigi enn útbúgvingum, ið taka trý ár, kann hava ávísar avmarkingar við sær. Hetta kann t.d. hava við sær, at ein, ið hevur gingið á fyrireikingarbreytini, og sum ætlar sær inn á ávísar hægri framhaldsútbúgvingar, kanska noyðist at taka eina ella fleiri lærugreinir á hægri stigi.

## Upptøka

Umsóknarfreistin til allar breytir er 15. mars 2013. Umsóknarbløð fáast frá framhaldsdeildunum í fólkaskúlunum ella frá miðnámsskúlunum. Treytin fyri upptøku er:

1. at tú hevur fullført 9. flokk fólkaskúlans ella hevur samsvarandi útbúgving frá øðrum lærustovni.
2. at tú hevur lokið kravdu próvtøkur fólkaskúlans í 9. flokki í skrivligum føroyskum, donskum, enskum og rokning/støddfrøði.
3. at tú hevur lokið tær munnligu próvtøkur fólkaskúlans í 9. flokki, sum Mentamálaráðið hevur tikið út.

Lýkur umsøkjari ikki onkra av omanfyristandandi treytur, kann einstaki skúlin gera eina ítøkiliga meting og taka støðu út frá henni.

Serstakar uppstøkutreytir eru í nøkrum førum til einstøku breytirnar.

Fyri at verða upptikin á náttúrubreytina, tilfeingisbreytina og tøknibreytina, skalt tú hava fingið royndarfyrireikandi undirvísing í minsta lagi 2 ár í alis-/evnafrøði.

Fyri at velja ávíst framhaldsmál á hugbreytini og búskaparbreytini, skalt tú hava fingið royndarfyrireikandi undirvísing í minsta lagi 2 ár í nevnda framhaldsmáli.

Fyri at søkja inn á fyrireikingarbreytina, skalt tú vera fyltur 18 ár í seinasta lagi 31. desember tað árið undirvísingin byrjar.

Frá 2014 ber til at søkja inn á 2. árið á búskapar-/tøknibreytini við ávikavist FHS-/SIT-prógvi.

## Stuðul

Næmingar á eini gymnasialari miðnámsútbúgving hava rætt til lestrarstuðul frá Studna. Søkt verður um stuðul, tá tú byrjar útbúgvingina.

Tey, ið eru undir 18 ár fáa ískoytisstuðul til keyp av undirvísingartilfari (bókastuðul). Harafturat er møguleiki hjá nøkrum av hesum næmingum at fáa ískoytisstuðul til vistarhald (vistarhaldsstuðul).

Bókastuðulin verður latin øllum næmingum, ið ikki hava fylt 18 ár innan 1. august, tá skúlaárið byrjar. Bókastuðulin verður útgoldin fyrst í stuðulsárinum.

Vistarhaldsstuðulin verður latin avbygdanæmingum undir 18 ár, sum noyðast at flyta til útbúgvingarstaðið. Treytin fyri at fáa henda stuðul er, at sjóvegis farleið er millum heimabústað og skúlan, ella at vegalongdin millum heimabústað og skúlan er longri enn 50 km.

Tey, ið verða 18 ár í stuðulsárinum, fáa stuðulin mánaðin eftir, at tey eru fylt 18 ár. Tá hava hesi eisini møguleika at søkja um lán.

Meira kann lesast um lestrarstuðulin og stuðulsskipanina á www.studni.fo.

## Undirvísingartilfar

Í miðnámsútbúgvingunum skalt tú sjálv/ur keypa alt undirvísingartilfar, eitt nú bøkur, sum verða brúktar í undirvísingini. Hetta merkir, at tú við skúlaársbyrjan mást rokna við at brúka einar 3.500 kr. til bøkur. Hvussu stór upphæddin er, veldst um, hvørjari breyt tú byrjar á. Harumframt kann tann einstaki skúlin krevja gjald fyri ljósritað tilfar, sum verður brúkt í undirvísingini.

## Próvtøka

Endamálið við próvtøkum og royndum er at skjalprógva, í hvønn mun próvtakarin hevur rokkið teimum málum og lýkur tey krøv, sum ásett eru í teimum einstøku útbúgvingunum og í teimum einstøku lærugreinunum. Einstaki skúlin skipar próvtøkurnar eftir nærri ásetingum frá Mentamálaráðnum.

Samlaða talið av próvtøkum skal vera 8 og í minsta lagi 3 og í mesta lagi 5 skulu vera skrivligar. T.v.s. at tú fer til antin 3 skrivligar og 5 munnligar próvtøkur, ella 4 skrivligar og 4 munnligar próvtøkur, ella 5 skrivligar og 3 munnligar próvtøkur.

Á tøknibreytini og tilfeingisbreytini telur verkætlanin í ávíkavist tøkni A og tilfeingi A sum ein skrivlig próvtøka.

Afturat teimum 8 próvtøkunum telur breytaverkætlan, ið allir næmingar gera, sum próvtøka á endaliga próvnum

Nærri treytir fyri próvtøkurnar í einstøku lærugreinunum eru ásettar í námsætlanunum.

## Hægri lestur

Eitt prógv frá einari gymnasialari útbúgving í Føroyum gevur atgongd til styttri útbúgvingar (1–2 ár), miðallangar útbúgvingar (2–4 ár) og longri framhaldsútbúgvingar (meira enn 4 ár), bæði í Føroyum og í útheiminum; tó við teimum avmarkingum, sum tær einstøku útbúgvingarnar seta, t.d. um ávísar lærugreinir á ávísum stigi.

## Møtiskylda

Í øllum miðnámsútbúgvingunum hevur tú møtiskyldu, og skyldu virkin at luttaka í undirvísingini. Um møtiskyldan ikki verður hildin, kann tað í ringasta føri enda við, at tú verður burturvístur og ikki sleppur til próvtøku.

## Stakgreinalestur og sjálvlestur

Fyri at verða tikin upp sum stakgreinalesandi skalt tú lúka tær fakligu fortreytirnar í lærugreinunum, sum tú innskrivar teg til. Innskrivingin fer fram á einum serligum oyðiblaði, ið fæst á skúlunum.Tú skalt venda tær til tann skúlan, har tú ynskir at fylgja undirvísingini og tosa við lestrarvegleiðara um upptøku. Stakgreinalesandi verða tikin upp, í tann mun pláss er á skeiðunum. Seinasta freist at innskriva seg sum stakgreinalesandi er 25. juni í tí ári, tú ynskir at byrja undirvísingina.

Tað ber til sum sjálvlesandi at fyrireika seg til gymnasiala miðnámsskúlapróvtøku. Í hesum føri skalt tú tosa við lestrarvegleiðara á skúlanum, har tú ætlar at fara til próvtøku, m.a. fyri at verða kunnað/ur um tað fakliga innihaldið í lærugreinunum, pensumkrøv og próvtøkukrøv. Í lærugreinunum alisfrøði, evnafrøði, ítrótti og lívfrøði skalt tú hava fylgt starvsstovuskeiðunum í lærugreinini, sum tú ætlar tær til próvtøku í. Innskriving til próvtøku sum sjálvlesandi fer fram í seinasta lagi 15. mars á tí skúla, tú ynskir at fara til próvtøku á. Lýst verður fyrst í februar mánaði í bløðunum viðvíkjandi innskrivingarfreist.

## Skúla- og lestrarvegleiðing

Á øllum fólkaskúlum og miðnámsskúlum eru skúla- og lestrarvegleiðarar, sum m.a. hava til uppgávu at kunna komandi og verandi næmingar um ymisku lestrarmøguleikarnar. Skúla- og lestrarvegleiðarar hava kunnleika til ymisku útbúgvingarnar og hava tilfar, ið kann vera hent hjá næmingunum at kunna seg við. Á heimasíðunum hjá einstøku skúlunum ber til at finna upplýsingar um vegleiðingina.






## Skúlar

- **FISKIVINNUSKÚLIN Í VESTMANNA**
  Breytir: Tilfeingisbreyt
  Bústaður: Fjarðarvegur 4; 350 Vestmanna
  Heimasíða: www.fiskvest.fo

- **FØROYA HANDILSSKÚLI Í TÓRSHAVN**
  Breytir: Búskaparbreyt
  Bústaður: Marknagilsvegur 77; 100 Tórshavn
  Heimasíða: www.fh.fo

- **FØROYA HANDILSSKÚLI Á KAMBSDALI**
  Breytir: Búskaparbreyt
  Bústaður: Dalsvegur 1, 530 Fuglafjørður
  Heimasíða: www.fhk.fo

- **FØROYA STUDENTASKÚLI OG HF-SKEIÐ**
  Breytir: Hugbreyt, náttúrubreyt og fyrireikingarbreyt
  Bústaður: Sanatoriivegur 13, 188 Hoyvík
  Heimasíða: www.hoydalar.fo

- **KLAKSVÍKAR HF-SKEIÐ**
  Breytir: Fyrireikingarbreyt
  Bústaður: Klaksvíksvegur 60
  Heimasíða: www.shey.fo

- **MIÐNÁMSSKÚLIN Í SUÐUROY**
  Breytir: Hugbreyt og náttúrubreyt
  Bústaður: Grønudalur 2, 950 Porkeri
  Heimasíða: www.midnam.fo

- **STUDENTASKÚLIN OG HF-SKEIÐIÐ Í EYSTUROY**
  Breytir: Hugbreyt, náttúrubreyt og fyrireikingarbreyt
  Bústaður: Dalsvegur 3, 530 Fuglafjørður
  Heimasíða: www.shey.fo

- **TEKNISKI SKÚLIN Í KLAKSVÍK**
  Breytir: Tøknibreyt
  Bústaður: Heygavegur 1A, 700 Klaksvík
  Heimasíða: www.tsk.fo

## Hvat er nýtt í nýggju skipanini?

1. Allar gymnasialar útbúgvingar eru javnsettar og virka eftir somu lóggávu.
2. Undirvísingartíðin verður gjørd upp í klokkutímum og býtt sundur í undirvísingartíð og næmingatíð. Næmingatíðin er tann tíðin, næmingurin brúkar til skrivlig avrik.
3. Lærugreinirnar eru býttar sundur í C, B og A stig á øllum breytum.
4. Lærugreinirnar eru í trimum bólkum. Felagslærugreinir, breytalærugreinir og vallærugreinir.
5. Týskt frá fólkaskúlanum er ikki eitt krav á hugbreytini.
6. Danskt A er ikki eitt krav longur á nakrari breyt, eins og tað heldur ikki er krav frá donskum hægri lærustovnum til føroysk lesandi.
7. Ítróttur og heilsa, samfelagsfrøði og søga eru krav á øllum gymnasialum breytum.

## Hent kunningartilfar

### Lógir og kunngerðir

- Løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar
- Undirvísingarkunngerð
- Upptøkukunngerð
- Kunngerð um lærararáð, samstarvsnevnd og næmingaráð
- Kunngerð um lestrar- og skilhaldsreglur
- Kunngerð um próvtalsstiga og døming
- Próvtøkukunngerðin

### Hentar leinkjur

www.namsaetlanir.net
www.breyt.net
www.studni.fo
www.mmr.fo



## Gymnasialar útbúgvingar

Tá ið tú skalt velja lestrarbreyt á gymnasialum miðnámsskúla, eigur tú at hugsa um, hvørja útbúgving tú hevur hug at halda fram við eftir loknan miðnámsskúla. Ein gymnasial miðnámsútbúgving er nevniliga fyrst og fremst ein fyrireiking til hægri lestur og hægri útbúgving innan ávíst øki ella yrki.

Tú hevur møguleika at velja millum fimm trý ára lestrarbreytir. Búskaparbreyt, hugbreyt, náttúrubreyt, tilfeingisbreyt og tøknibreyt. Harafturat ber til at velja fyrireikingarbreytina, sum er ein tvey ára breyt, ið serliga er ætlað tilkomnum næmingum.

Í hesum faldaranum verður greitt frá einstøku breytunum. Hvussu tær eru uppbygdar, hvørjar lærugreinirnar eru, hvat eyðkennir ymisku breytirnar, og hvørjar møguleikar tær geva.

estra®

Svanamerktur prentlutur 541-894